# Dómarayvirlit

### Formuladeildin

*Sunnudagin 23/09*

| | |
|---|---|
| KÍ – GÍ | Páll Augustinussen |
| NSÍ – AB | Jens Petur Brattalíð |
| HB – EB/Streymur | Petur Reinert |
| VB/Sumba – B71 | Eiler Rasmussen |
| *Mánadagin 24/09* | |
| B36 – Skála | Lars Müller |

### 1. deild menn

*Leygardagin 22/09*

| | |
|---|---|
| TB – SÍ | Jan Skoradal |
| HB – LÍF | Jón Kári í Brekkuni |
| FSV 04 – ÍF | Dagfinn Olsen |
| B36 – B68 | Rói Jacobsen |
| KÍ – NSÍ | Bárður Mortensen |

### 1. deild kvinnur

*Leygardagin 22/09*

| | |
|---|---|
| GÍ – KÍ | Bjarki Danielsen |
| AB – B36 | Jóhan P. Michelsen |

### 2. deild menn

*Sunnudagin 23/09*

| | |
|---|---|
| EB/Streymur – Fram | Marner Olsen |
| MB – B68 | Andrass Weihe |
| GÍ – ÍF | Johnleif Gerðisá |
| FSV 04 – KÍ | Valdemar á Løgmansbø |
| B36 – Skála | Laurits í Króki |

# Eigur ikki at kiksa hjá NSÍ

**Men talan verður neyvan um beinleysa avgreiðsluuppgávu, tá ið AB, sum spælir fyri lívinum, fer at vitja í Runavík**

**NSÍ-AB**
*Jákup Mørk*

Tað líður ímóti endanum á hesum kappingarárinum. Tað sæst eitt nú aftur í, at NSÍ sunnudagin fer at spæla fyri triði síðstu ferð í ár á heimavølli.

Gulldreymurin er størri enn nakrantíð, og tað er gulldeymurin eisini. Síðsta sunnudag stóðu teir gulu og svørtu eina tí torførastu royndina á tronga vegnum ímóti FM trónuni. Tí hevði tað verið heilt burturvið, um NSÍ sunnudagin kiksaði á heimavølli ímóti AB, sum hevur ryggin ímóti múrinum.

- Vit fokusera upp á eina avbjóðing í senn, og tað hevur áður víst seg at vera torført ímóti AB í Runavík, verður sagt í NSÍ.

Sipað verður til heimadystin ímóti argjamonnum í 9. umfari. Hann endaði við 2-1 heimasigri, men AB var væl við, og fram ímóti dystarenda stríddust teir fyri at javna.

Á Argjum kendu teir seg sunnudagin við 3-1 heimasigri á KÍ at fáa um endan aftur í stríðnum fyri at sleppa undan niðurflyting. Men treytirnar eru harðar. Um AB einki fær við úr Runavík, og um B71 samstundis vinnur í Vági, so verður sannlíkið fyri niðurflyting ógvuliga stórt longu undan fýra teimum síðstu umførunum.

Tá ið NSÍ 12. august var á Argjum, vunnu gestirnir 2-0.



*Tað verður neyvan nakar lættur dystur hjá oddaliðnum NSÍ, tá ið AB vitjar sunnudagin. AB hevur fyrr í ár givið NSÍ ein skarpan gang, og við sigrinum ímóti KÍ mánadagin hevur AB økt um møguleikarnar at vera veranda í bestu deildini.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Við – ikki við

**Skaddur: Morten Overgaard (knæskaði)**
**Ivasamur: Hanus Jacobsen (rivjabein)**
**Leikbann: Allan Mørkøre og Christos Patsamaris**

**Ivasamur: Bergur Midjord (vøddaskaði)**
**Við aftur: Sylla D. Ahmed (burturstaddur seinast)**

**Við aftur: Eirikur Poulsen (eftir leikbann)**

**Skaddur: Zsolt Szekeres (knæskaði)**
**Ivasamur: Ronnie Samuelsen (knæskaði)**
**Leikbann: Hans Pauli Samuelsen**

**Skaddur: Sámal Joensen (knæskaði)**
**Ivasamur: Hans Jørgen Djurhuus (heilaskjálvta)**
**Við aftur: Sverri Jacobsen (eftir leikbann) og Tomasz Sajdak (eftir leikbann)**

# B71 kann bjarga sær

**Felags fyri báðar partarnar, sum hittast á Vágseiði, er, at úrtøkan síðani summarsteðgin hevur verið sera soltin**

**VB/SUMBA-B71**
*Jákup Mørk*

Eftir tvær ferðirnar seks mál ímóti sær á útivølli eigur VB/Sumba hesa ferð heimavøll. Vánirnar fyri at bjarga sessinum í Formuladeildini eru lítlar ella rættari ongar. VB/Sumba hevur burtur úr 223 dystum vunnið 11 stig. Tað eru 12 stig fram til triði aftasta plássið, og eingin – heldur ikki tey í VB/Sumba – halda tað vera realistiskt, at tað skal bera til at bjarga sær.

- Men vit skylda okkum sjálvum, viðhaldsfólkunum og øllum øðrum at leggja tað fyri, sum vit megna, verður sagt úr Vági.

Um talan skal verða um bjarging, so er tað B71, sum fatur skal fáast á. Takið hjá sandoyingum er fyrst og fremst at renna undan AB, sum er seks stig aftanfyri. Við úrtøku á Vágseiði kunnu sandoyingar næstan tryggja sær rættin eisini næsta ár at spæla í fremstu røð.



*Magnus Olsen og B71 kunnu næstan tryggja sær lívið í bestu deildini, um teir fáa fult á útivølli ímóti VB/Sumba sunnudagin.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Felags fyri bæði VB/Sumba og B71 er tað, at úrtøkan síðani summarsteðgin hevur verið ógvuliga lítil. B71 hevur burturúr seks umførum vunnið tvey stig. Annað vunnu teir í málleysum heimadysti ímóti júst VB/Sumba, og hitt vunnu teir síðsta sunnudag á Skála. Tá var aftur málleysur javnleikur.

B71 hevur síðani í summar havt stórar trupulleikar at skjóta mál. Í seks dystum er málmunurin 3-12!

Hjá VB/Sumba gekk tað í fyrstu umførunum eftir summarsteðgin illa at finna mótstøðumálið. Tvær tær seinastu ferðirnar hava teir í VB/Sumba skorað ávikavíst trý og tvey mál á útivølli, meðan tað í verjupartinum hevur gingið illa. Málmunurin seks tær seinastu ferðirnar hevur verið 7-18, og úrtøkan hevur verið eitt stig!